# Birgit av Lofti sjeyti



Mánadagin 14. februar verður Birgit av Lofti í Havn, sjeyti ár. Sigast kann um Birgit, at hon er ein ekta havnarkvinna. Røtur hennara røkka fleiri ættarlið aftur í havnar søgu.. Hon er fødd í sjálvum hjartanum í gomlu Havnini – niðri á Áarvegnum. Barndómsheimið var har sum Hotel Hafnia er nú, við einum gerandisútsýni yvir á Amtmansborgina, har greinarnar av gullregn-trænum í hesum garðinum hingu so vakrar omanyvir Áarvegin.

### Fødd við Áarvegin

Fyrstu barndómsárini hevði pápin, Christian Dahl-Restorff, tubbakshandil í kjallaranum í heiminum á Áarvegnum. Men tá ið Birgit var 9 ára gomul, bygdi hann hotel Hafnia har. Í 1948 flutti húskið í nýbygd hús uppi á Hoyvíkskvegi 17.. Birgit er næstelst av børnunum hjá Mariu og Christian. Hini eru: Jóhan, Kirstin og Martin Christian (MC).

### Ættarfedrar

Langabbi hennara var hin navnframi handilsmaðurin M.C. Restorff, sum var millum teir fyrstu, ið fingu loyvi at hava handil, eftir at kongligi einahandilin var avtikin í 1956. Sonur hansara, Johan Restorff, abbi Birgit, var ein kendur skipari. Omman Johanna var eisini av kendari ætt í Havn, Dalaættini dóttir Christian Christiansen, vanliga nevndur Christian í Dali ella "Loðsurin". Langomman, kona Christian í Dali, æt Helena

Í móðurætt skal nevnast abbi hennara, handilsmaðurin, Hans Joensen, sum stovnaði handilsfyritøkuna, Fa. Hans Joensen, sum helt til har handilskjarnin nú er í Niels Finsensgøtu. Hann var giftur við Anette Joensen, sum var fødd í Haugesund, men flutti við foreldrum og syskjum til Skotlands, seinni kom Anette til Føroya at búgva. Maður hennara, Hans Joensen, var ein av teim allarfyrstu, sum fóru at savnast til møti saman við skotska trúboðaranum Williami Gibson Sloan. Hans Joensen í mong ár forsangari í samkomuni í Ebenezer. Hans og Anette fingu børnini: Hans, Rudolf, Annu og Mariu, sum varð mamma Birgit.

### Hotel-útbúgving

Birgit fór sum 14 ára gomul at arbeiða á hotellinum hjá pápanum og sum 18 ára gomul fór hon í smyrjubreyðslæru á hotel Baltic í Nykøbing Falster í Danmark og helt seinni fram at útbúgva seg á "Håndværkerforeningens Selskabslokaler" í Dronningens Tværgade í Keypmannahavn.

Í 1961 kom hon heimaftur at arbeiða á hotellinum hjá pápanum og arbeiddi har so leingi sum tað var í hondunum á Restorffsættini, tó arbeiddi mestsum ikki úti tá ið synirnir vóru í skúlaaldri.

### Andalig tænasta

Birgit vaks upp í einum andaligum heimi saman við góðum foreldrum, gekk í sunnudagsskúla og hevur alt lív sítt verið knýtt at samkomuni í Ebenezer. Hon hevur mangan greitt frá, at tað var norska omma hennara, sum hevði eina avgerandi andaliga ávirkan á hana, so at ommudóttirn longu sum 8 ára gomul kom til trúgv á Jesus og tók eina andaliga avgerð og hevur síðani fylgt trúføst í fótasporum frelsarans.

Umsorgan fyri menniskjum hevur verið eitt av eyðkennum hennara. Mong eru tey, ið hava notið gott av eini hjálpandi hond, einum góðum orði, bøn ella sangi frá henni, tá ið hon hevur vitjað inn á gólvið ella hitt fólk á havnargøtum. Í trúboðaravirkinum saman við Svenningi, hava tey bæði virkað og staðið saman sum ein samanrunnin heild. Heimið á Sólteigi 4 hevur, í góðum grannalagi, verið eitt opið heim.

### Sangurin eitt hjartamál

14 ára gomul fór mamma at syngja í Ebenezerkórinum – og har er hon enn. Hon hevur sostatt verið knýtt at kórinum í 56 ár – við undantak av teimum tveimum árunum hon var undir útbúgving í Danmark. Hvønn dag syngur hon í Lindini í samband við andaktina hjá pápa okkara.

Í hjúnalagnum eiga babba og hon okkum tríggjar synir: Petur, sum býr í Sandavági, Marner, sum býr í Ålborg og Dan, sum býr í Streymnesi. Tey kunnu gleða seg um tær báðar fittu abba- og ommudøturnar, Rebekku og Barbaru í Ålborg og verdøturnar, Mathildu í Streymnesi og Unn í Ålborg. Á hesum stóra degi ynskja vit, synir hennara, at veita kæru móður okkara eina hjartaliga tøkk fyri alt, sum hon hevur verið fyri okkum.

Føðingardagin 14. februar er mamma burturstødd, men føðingardagshaldið verður á skúlaheiminum við Marknágilsvegin leygardagin 19. februar kl. 10 við morgunmati. Sum lýst hevur verið, er neyðugt at tekna seg eina viku áðrenn.

**Synirnir**

---

## Tøkk

*Øllum tykkum, ið á ymiskan hátt mintust meg á 75 ára degnum, takki eg hjartaliga.*

*Eina serstaka heilsan til Tjóðveldi, ið møtti so fjølment.*

*Blíðar heilsanir*
**Óli Petersen**

---

## Tøkk

*Hjartaliga takki eg øllum, ið mintust meg 90 ára føðingardagin 26. januar.*

*Blíðar heilsanir*
**Sanna á Teigum**

---

†

**Páll Egholm Jacobsen**
**ættaður av Glyvrum, búsitandi í Gøtu**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsmorgunin, 58 ára gamal.

Kistan fer av Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju fríggjadagin kl. 13.00.

*Vegna tey avvarandi*

Tey, ið vilja minnast Páll, kunna senda eina peningagávu til Elisabet Mariu og Elinborg, konta í Bank Nordic.

---

## TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Rikka Sigtryggson**
**Klaksvík**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum øll á Niðristovu, sum vóru um hana ta seinastu tíðina, tað varð hennara heim. Tøkk eisini til tykkum heimahjálpir og heimasjúkrasystrar, ið komu í hennara heim í Lávíkum. Takk til Magnus Brahé, prest, fyri góð orð í kapellinum og kirkjuni.

Eisini ein tøkk til kirkjutænarar og gravara. Tøkk fyri blómur og kransar, og til tykkum, ið góvu eina peningagávu til Christianskirkjuna. Øllum tykkum, ið hjálptu til á ein ella anna hátt, ljóðar eisini ein tøkk. Tøkk øll, sum fylgdu henni til hennara síðasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**

---

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Sólbjørn Jacobsen**
**Tórshavn**

brádliga andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest, organistar, sangarar, berarar og øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum. Takk fyri kransar, blómur, heilsanir og peningagávur til Hjartafelagið. Takk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Else**
**Lars, Gunnvá og Lisbeth við familjum**